**Løgtingslóg**

**um**

**broyting í løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya**
(Leingjan av tíðarskeiðnum, ið ferðandi skulu rinda avgjald við komu til Føroya)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 139 frá 29. september 2020 um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 189 frá 18. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1 verður "1. oktober - 31. mars 2021" broytt til: "1. oktober 2020 til og við 31. august 2021".

**2.** Í § 4, stk. 1 verður aftan á "1. oktober 2020" sett: "og fer úr gildi 1. apríl 2022".

**3.** Í § 4 verður sum stk. 2 og 3 sett: "*Stk. 2.* Um kravið um kanning við komu verður slept áðrenn 1. januar 2022, verður avgjaldstíðarskeiðið, sum er nevnt í § 1, stytt samsvarandi.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu henda broyting verður framd í verki."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 25. mars 2021 við 31-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 25. mars 2021

stjóri

lm. nr. 92/2020